Svend Krosstein P/F



## Skrivstovulærlingur søkist

Kundi tú hugsa tær eina framtíð innan skrivstovuyrkið?

Vit hava pláss fyri einum skrivstovulærlingi (m/k) í fyritøku okkara.

Vit kunnu bjóða tær:

- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu í støðugari menning, har tú gerst partur av einum góðum toymi og har arbeiðsandin er av teim bestu.
- Tryggar arbeiðsumstøður.
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning.

Tú mást hava HH ella FHS prógv.
Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár.
Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri til tíðir at arbeiða undir trýsti.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosað við Anniku Krosstein ella Harald Eirikstoft.

Umsóknarfreistin er 10. juli 2007.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum til:

P/F Svend Krosstein
Postboks 3229
FO-110 Tórshavn
Viðm.: Læarupláss

P/F Svend Krosstein er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 20 fólk í fulltíðarstarvi. P/F Svend Krosstein er einasta HVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat størsta HVS-handil í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveitingar, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskireiðskap og annað.

TEAM85

## Fólk til Farmastøðina í Klaksvík

Í sambandi við farloyvi verður søkt eftir einum fólki í tíðaravmarkað starv til Farmastøðina í Klaksvík frá 1. september 2007 til 30. juni 2008. Arbeiði fevnir m.a. um farmaavgreiðslu og koyring til/frá Kalsoy og Másanum

**Starvið fevnir um**

- Koyring
- Skipaavgreiðslu
- Kundaavgreiðslu
- Goymslu v.m.
- Viðlíkahald

**Førleikakrøv**

- Koyrikort til lastbil
- Trukkprógv
- Góðan røkjuskap
- Kundavinarligur

**Setanartreytir**

Starvið verður sett eftir høvuðssáttmálanum hjá Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag.

**Umsóknir**

Umsóknir við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 16 juli 2007.

Ynskjast nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, deildarleiðara, á tlf. 543061 ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

## Søkt verður eftir roknskaparstjóra til Gjaldstovuna

Dámar tær avbjóðingar, tøl og at leiða, so ert tú kanska næsti roknskaparstjórin á Gjaldstovuni. Nýggi roknskaparstjórin skal standa fyri roknskaparhaldinum hjá landinum og fyri roknskaparligu umleggingunum, sum verða næstu árini.

Talan er um eitt stórt konsernroknskaparhald, har samanhangirnir ofta eru torgreiddir. Tí er neyðugt, at tú hevur yvirlit yvir røttu samanhangirnar, skilir roknskap og dugir væl við tølum. Roknskaparhaldið er so at siga 100% elektróniskt. Tí er tað ein fyritreyt, at KT er ein heilt natúrligur partur av tínum geradisdegi.

Í høvuðsheitum verða ábyrgdarøki tíni at:

- leiða arbeiðið í roknskaparhaldinum, har um 15 fólk arbeiða
- viðgera roknskaparspurningar
- fremja og støðugt menna innaneftirlit
- gera og viðlíkahalda internar mannagongdir á roknskaparøkinum
- seta í verk nýggjar KT-loysnir
- tryggja, at broytingar og nýggjar loysnir virka, sum tær skulu (nároyna)
- viðlíkahalda roknskaparregluverkið hjá landinum, herímillum at arbeiða við einum nýggjum roknskaparreformi

Vit kundu hugsað okkum, at tú:

- ert í 30- ella 40-ára aldrinum
- hevur ástøðiliga útbúgving á roknskaparøkinum, t.d. cand.merc.aud.
- hevur drúgvar royndir at arbeiða við bókhaldi, roknskapi og innaneftirliti
- hevur leiðsluroyndir
- megnar at byggja brúgv millum roknskap og KT
- hevur áhuga fyri KT og brúkar KT í dagliga arbeiðinum

Starvið er lønt í 37. lønarflokki hjá tænastumonum landsins, og í eftirlønargjaldi verða goldin 15%. Starvið er ikki tænastumannastarv, men verður sett eftir serligari avtalu.

Umsóknarfreistin er 26. juli 2007. Umsóknir skulu verða stílaðar Føroya Gjaldstovu, Postboks 2009, 165 Argjum.

Hevur tú spurningar um starvið, kanst tú ringja til Leif Abrahamsen, fartelefon 214660, ella Duritu Tausen, fartelefon 214954.

Les meira á www.gjaldstovan.fo

Um Gjaldstovuna:
Gjaldstovan rekur Búskaparskipan landsins. Høvuðsskipanirnar eru roknskaparskipan við undirskipanum, felags lønarskipan, dátuvøruhús, leiðslukunningarskipan, búskettskipan og portalur.

Gjaldstovan undirvísir í skipanum, ger brúkaravegleiðingar, er við í ymsum verkætlanum, ráðgevur í spurningum um roknskaparverk landsins, búskaparstýring og Búskaparskipan landsins.

Í EDV-skipanunum er kjarnuskipanin ERP-skipanin Oracle E-business Suite. Allar skipanirnar, tær flestu webskipanir, eru savnaðar á einum portali, sum seinni í summar verður atkomiligur frá alnetinum.

Ovasti myndugleiki fyri EDV-trygdini er hjá EDV-trygdarráðnum. Roknskaparstjórin er limur í ráðnum.

Missiónin hjá Gjaldstovuni er at skapa fyritreytir fyri munadyggari og kvalifiseraðari búskaparstýring hjá landinum.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Føroya Gjaldstova

REPROZ